

*Esmar Fuglø á Brúnni á Leivur Øssurson*

Johan fer ein dagin út til døgurða, beint tá eg var komin til handils. Eg stóð og bíðaði og bíðaði uttan fyri diskin, men eingin spurdi, hvat eg skuldu keypa. Eg var um 8-9 ár. At enda fekk eg maktarloysi og setti meg út á trappuna. Nú kemur Johan aftur frá døgurða. Hann hevði verið leingi burtur. So sigur hann: "Á, góða, hví situr tú her?" "Ja, men eg havi einki fingið at keypa." Hann fór inn í krambúðina, og hann deildi genturnar: "Hendan genta stóð her, táið eg eg fór til døgurða. Nú er tríggir tímar gingnir, og tit hava ikki givið henni enn." Men tá gekk tað eisini skjótt fyri seg.

Vøruna fekk mann annars einaferð um vikuna, Vit bíløgdu vøruna, og tá var tað Sleiparin, ein bátur hjá Mortensen, sum sigldi við henni inn á bedingsbrúnna, har vit búðu. Eg minnist serliga upp undir eini jól, at vit vóru serliga spent at bera hesa kurvina frá brúnni og yvir í Puntabyrg. Vit skundaðu okkum at pakka út, tí tað var altíð ein lítil posi við onkrum góðgæti í til óvitarnar. Hetta var sera stuttligt. Tá vóru børn heldur ikki so forvand.

Tað var nokk so langt at fara um í sóknini, tí var ofta farið við báti. Vit gingu heldur ikki út á kajuna, sum tá skip komu niðri frá. Hetta var ein stórhending á Tvøroyri eins og í Havn. Abbi plagdi at rógva okkum út.

Hann tók okkum eisini út á fjørðin at fiska seið. Petur Emil, son Nikolinu mostir, plagdi at vera við okkum. Eg minnist einaferð, at vit fingu 95 seiðir. Abbi róði, og vit bæði dyrgdu. Hetta var eisini gott ískoyti til húsarhaldið.

Tað var eisini kastað nógv nót, og tá kundi heilt nógv vera fyri. So bleiv man sendur við einum fati av seiði runt til ymisk hús at geva teimum.

Eg minnist bedingsmeistaran, sum var úr Vestmanna. Hann var beint komin til bygdina. Sum kona hansara var glað, tá ið eg kom við einum fati av seiði til teirra. Tá var man glaður fyri lítið.

Tað sama var, tá ið grind var. Tá syrgdi teir, sum vóru heima, altíð fyri at koma við grindini til teirra, sum vóru til sjós. Hetta fekk eg eisini sjálv roynt, tá maður mín var til sjós. Soleiðis er tað enn dagin í dag. Tað var sera gott samband og samanhald millum fólk.

## Søgan um AT

Tað vóru nógv virkir og nógv arbeiði á Tvøroyri. Men fyrra partin av 1930-unum var heimskreppu. Hon rakti eisini Føroyar og ikki minst Tvøroyri, sum var so heft av tí, sum sjógvurin gav. Her gekk eisini niður á bakka hjá nógvum. Í 1936 fer A/S J. Mortensens Eft. á húsagang. Hetta var ein tann størsta fyritøkan í bygdini, eisini í landinum. Teir høvdu nógv skip og stóran handil við ikki færri enn 21 úthandlum úti um landið. Hetta var ein vanlukka fyri Tvøroyri og arbeiðandi fólkið har. Var einki arbeiði var heldur eingin inntøka.

Hetta fekk so hugskotið fram, at nú máttu arbeiðararnir sjálvir taka um endan. Tað endaði eisini við, at búgvið hjá Mortensen varð keypt av Arbejdernes Trawlerdrift, AT, sum Fylking og Fiskepigernes Fagforening stóðu aftanfyri.

Hesa søguna greiðir Jóannes Dalsgaard gjølla frá í sín bók Fylking og skal her bert takast okkurt fram.

Eftir nógv millumspæl og tingingar keypa feløgini ognirnar úr búnum hjá J. Mortensen.

AT varð stovnað 3. juni 1936. Tað varð stýrt av nevnd við fimm limum, sum var kallað driftsráð, sum vist hevði meira at siga enn ein vanlig nevnd. Stjóri gjørdist Hjalgrim á Heygum úr Vestmanna. Stovnandi feløgini áttu hvør sínar tveir limir í driftsráðnum og kommunan tann fimta.

Tá var Gunnar Petersen, mammubeiggi, longu virkin í Fylking, og hann var ein av teimum, sum skrivaði undir viðtøkurnar hjá AT vegna Fylking.

## Avgerandi at hava skip

Tað ráddi um at fáa skip til fyritøkuna, og hetta endaði við keypi av Leivi Øssurson. Tað var mett, at felagið hevði gjørt ein góðan handil. Trolarin var bygdur í 1924 og var í góðum standi.

Nú komu fakfeløgini eisini at gerast arbeiðsgevarar. Hetta kom eisini at merkjast, tá ið AT bað um ymisk frávik frá tí sáttmála, sum hevði verið. Tað var heldur ikki uttan trupulleikar at reka skip tá heldur enn nú.

AT rak í fyrsta umfari reiðara- og fiskavirkisvirksemi. Leivur Øssurson var á saltfiskaveiðu. Fiskurin var landaður og turkaður hjá AT. Hetta gav nógv arbeiði á landi eisini.

Men tað var eisini nógv annað virksemi. Her var eisini ein stórur handil. Í uttasta rúminum vóru kolonialvørur, í mittasta rúminum var ísinkram og tílíkt og so ein gott fylt toystova. Handilin var har sum Telebúðin er nú. Og so vóru øll hesi pakkhúsini. Umframt hetta vóru tað sethúsini, sum hoyrdu til virkið. Eg skilji ikki, at tey ikki vórðu varðveitt.

Tað varð eisini bakarí, kolasøla og ymsar goymslur við útgerð hjá trolarunum.

Seinni, tá virksemið var í hæddini, hevði AT eisini timburhandil, trolvirki og trolskúla. Hetta man hava mint eitt sindur um støðuna hjá Kjølbro í Klaksvík.

Um heystið 1936 vóru stórir trupulleikar við fígging av rakstrinum hjá Leivi Øssurson. Men tað eydnaðist at fáa hetta greitt í fyrsta umfari.

Roynt var at fáa fólk at keypa frá AT við at lova teimum arbeiði í mun til tað, tey keyptu í handlinum.

Tað vóru tey sum hildu, at hetta minti nakað nógv um støðuna, sum førdi til krav um løngjaldsstovu.

Á heysti 1937 vóru trupulleikar við sølu av saltfiski, og umhugsað varð at leggja um til ísfiskaveiðu, sum mótsatt saltfiski lítið og einki arbeiði gav fólkinum á landi. Hildið varð tó fast við saltfiskaveiðuna samstundis, sum turkihúsið skuldi nútímangerast.

Nú fór at ganga framá, og AT gjørdist størsta arbeiðspláss á Tvøroyri. Tað varð eisini arbeitt við at fáa ein trolara afturat, men hetta hendi ikki fyrr enn aftaná kríggið.

Tað var eydnaðist AT at minka munandi um arbeiðsloysið á Tvøroyri og harvið at lætta um gerandisdagin hjá arbeiðarahúskjunum í bygdini.

Í 1938 hevði AT goldið 127.000 kr í lønum í hýrum og lønum umframt lønir til jarnsmiðir, bilførarar og timburmenn. Hetta var ein sera stór upphædd tá í tíðini.

## Petur Mohr Dam ringir

Eg hevði onkuntíð verið vikarur sum lærari fyri Petur Mohr Dam, tá ið hann var burturstaddur.

Í 1939 hevði eg ætlað mær niður á studentaskúla og skuldi eg búgva hjá mostir míni Dagmar, sum var ógift. Hon vildi orðna alt fyri meg, um eg kom. Hetta var freistandi í eini tíð, tá nógvar gentur vildu royna lívið úti í heimi við at fara til Danmarkar eina tíð.

Men ein dagin ringir Petur Mohr Dam. Eitt systkinabarn mítt, sum hevði arbeitt hjá AT, var deyð. Dam



*Aftast Niels Juel Thomsen. Frammanfyri f.v. Solveig Samsonsen, Niels Niclassen, hjá Carl og Alexandra Hansen*



*Krambúðin hjá a/s J.Mortensen, sum AT keypti í 1936*



*Puntabyrgi liggur í Trongisvági. Her sæst eisini bedingin*